# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Rís og rós

Veljarakanningin, ið varð almannakungjørd í gjár, gav Sambandsflokkinum rós og Javnaðarflokkinum rís. At Sambandsflokkurin veksur í tíðum, sum hesum er einki óvanligt. Tað er sum løgmaður sigur: fólk velja tað trygga, tá útlitini eru døpur. Formaður Javnaðarflokksins er sum vera man ikki fegin, tí úrslitið er lítið hugaligt. Javnaðarflokkurin verður sendur 77 ár aftur í tíðina við undirtøku frá einans 14,4 prosentum, meðan Sambandsflokkurin er stóri vinnarin og fær 27,7 prosent.Versta val Javnaðarfloksins yvirhøvur var í 1994, tá flokkurin fór úr sløkum 28 prosentum niður í 15,4.

Tað kann hvørki vera lætt ella hugaligt hjá formanninum at gera viðmerkingar til eitt slíkt úrslit. Formaðurin valdi ta klassisku frágreiðingina, nevniliga, at tað ikki var eydnast at greiða frá politikki floksins, boðskapurin var ikki komin út. Tað kann væl vera, at hetta er ein partur av orsøkini til aftirgongdina. Men nógv bendir á, at her er annað og meira, sum nívir veljarar floksins. Hugsað verður her um tann politikk, sum flokkurin meira enn hinir báðir samgonguflokkarnir er vorðin eitt við: sparingar, framdar so væl sum ætlaðar á økjum, sum raka pensjónistarnar. Fyrst varð heilivágstilskotið lækkað við tí úrsliti, at pensjonistar hava fingið dupult so stórar útreiðslur til heilivág, sum teir høvdu frammanundan. Her vórðu tjúgu milliónir tiknar frá pensjonistunum. Síðan kom ólavsøkupakkin, har ætlanin var og framvegis er at taka 25 milliónir frá pensjonistunum.

Tað er ikki meira enn einir fjúrtan dagar síðan, at formaður Javnaðarfloksins í útvarpinum tvíhelt um, at hann skuldi hava 25 milliónir frá føroysku pensjonistunum. Er tað so løgið, at flokkurin missir undirtøku? Eftirhondin kann ein næstan fáa ta fatan, at einasta bjarging úr kreppuni er at nartla burturav frá pensjonistunum, sum frammanundan hava tungt við at fáa endarnar at røkka saman. Hetta virkar hvørki logiskt ella skilagott, tá hugsað verður um støðuna hjá pensjonistunum. So seint sum í gjár vísti næstformaðurin í Landsfelag Pensjonista á, at pensjonistar undrast á ráðini at venda gongdini við at fara eftir pensjónunum, tí sum kunnugt hevur útgjaldið av fólkapensjón til tann einstaka pensjónistin so at siga verið sama krónutalið tey seinastu 10 árini. Meðan lønir, prísir og ikki minst BTÚ eru vaksin nógv hetta tíðarskeiðið, hava bert teir fólkapensjónistar, sum fáa viðbót til fólkapensjónina, fingið eina minimala regulering av útgjaldinum.

Pensjonistar hoyra uttan iva til allar flokkar, men Javnaðarflokkurin hevur síðan 1958 verið flokkurin, sum burturav hevur røkt áhugamál pensjonistana. Tað er tí kanska ikki av leið at hugsa, at Javnaðarflokkurin eisini eigur at finna orsøkirnar til afturgongdina í floksins støðu til pensjonskipanina bæði við atliti til ólavasøkupakkan og til framtíðarpensjonskipanina – tað sonevnda embætismannauppskotið.

**Sosialurin**

## Vassa ikki longur út, Jóhan Dahl!

**BERGTÓRA HØGNADÓTTIR JOENSEN**



Landsstýrismaðurin í javnstøðumálum sigur nú, at vit ikki kunnu hava javnstøðu í nevndum og ráðum – tí 2000 færri kvinnur enn menn eru í Føroyum! Grundgevingar hansara tykjast meir og meir margháttligar, tá talan er um javnstøðu. Átti landsstýrismaðurin í javnstøðumálum ikki at veri hann, sum varpaði ljós á og í gerðum gjørdi sítt til, at hesar kvinnur flyta heim aftur?

### Kvotur ein møguleiki?

ST-javnstøðunevndin mælir til kvotur, til tess at fremja javnstøðu. Haldi, at kvotur eru ein neyðloysn – men eisini eitt munagott amboð, sum kann vera neyðugt í eini skiftistíð. Vit hava prógvað, at tað gongst illa at fáa javnstøðu sum er. Eitt alt ov dýrabart tilfeingið fer fyri skeyti uttan javnstøðu. Fjølbroytni, eisini í nevndum, er best gongda leiðin – og fleiri hava víst á, hvussu positivt tað er fyri trivnaðin og arbeiðsumhvørvið á einum arbeiðsplássið ella einari nevnd, at bæði kyn eru vælumboðað, og at fólk sum trívast, skapa betri úrslit.

Um ein kvotuskipan hevði virkað í nøkur ár ímyndi eg mær, at tað hevði eggjað fleiri kvinnum til at hildi seg framat, umframt at tær kvinnurnar sum komu í nevndir og leiðarastørv eisini høvdu 'peikað' á fleiri kvinnur. Tí mangan sæst – tá størv skulu setast – at arbeiðsgevarar hugsa fyrst um ein tey ein longu kenna ella fólk, sum minna um tey sjálvi.

### Óførar í skúlanum, men

Í summar var ráðstevna um javnstøðu í skúlunum í Norðurlandahúsinum. Har varð sagt at, tað er ein avbjóðing at fáa fleiri menn at útbúgva seg til og arbeiða sum lærarar. Skúlar og stovnar ynsktu sær fleiri lærarar og námfrøðingar, sum vóru menn!

Men eitt sum tóktist løgi var hetta: genturnar skara framúr í skúlunum. Møta væl upp, fylgja væl við og fáa bestu próvtølini. Eisini verða tær betri útbúnar. Kortini er inntøka teirra nógv lægri enn hjá monnunum og tær manna sjáldan størvini við hægstu lønini ella størsta valdinum.

### Javnvág familju og arbeiðslív

Ofta sigast kvinnur at velja vælløntu størvini frá, tí tær vilja hava betri tíð til familjuna. Skilji hugburðin og eri lutvís samd. Og júst tí tørvar okkum eina størri vitan um – hvørji átøk skulu til, til tess at familjurnar í Føroyum kenna størri javnvág millum arbeiðslív og familjulív. Nøkur boð kundu verið:

· longt barnburðarfarloyvi
· fleksiblari barsilsskipan
· rætt til løn barnsins 1. sjúkradag
· pápakvota
· flekstíð
· betri møguleikar at arbeiða heimanífrá
· Men vit mugu fáa at vita, hvat veruliga skal til til tess at føroyska familjan kennir størri javnvág millum familju og arbeiðslív.

### Hví flýggja tær?

Norðuratlantsbólkurin gjørdi í 2008 kanning um, hví føroyingar velja at búseta seg uttanlands. Tvær orsøkir vístu seg at vera ov vánaligar sosialar skipanir og konservatisma í føroyska samfelagnum. Og sanniliga skilji eg grundgevingarnar. Børn og ung við serligum tørvi verða send av landinum, korini hjá støku uppihaldarunum kunnu ikki samanberast við tey í øðrum norðurlondum, bústaðarmøguleikarnir eru fáir. Verandi samgonga hevur heldur ikki tikið barsilsskipanina upp á tunguna. Fyri ikki at nevna pápakvotuna! §266b tók meir enn 25 ár at fáa samtykta og javnstøðulógin ártíggju!

### Nevndarvalið í Atlantsflog

Í vár varð varpað ljós nevndarvalið í Atlantsflog. Eingin kvinna var í nevndini. Landsstýrismaðurin segði tá, at tað kravdi serligar førleikar, felagið var jú børsskrásett. Men hvørjir hesir serligu førleikarnir vóru fingu vit einki at vita um – ella júst hvat tað var, sum kvinnunum tørvaðu fyri at fáa møguleikan.

### Hvussu verða nevndarlimir valdir?

Forkvinnan í Javnstøðunevndini – Kristianna Winther Poulsen – sigur, at vit mugu fáa lýst:

· Hví so trupult er at fáa kvinnur á privata arbeiðsmarknaðin
· Hvørjar eru røttu kvalifikatiónirnar
· Hvussu ávirka vit til broytingar

Haldi hetta ljóðar sera skilagott. Og fingu vit hesum spurningum svaraðum, tá bar ikki til hjá landsstýrsmanninum sum varar av økinum at koma við grundgevingum – sum teimum vit hoyrdu fríggjakvøldið. Og hvør veit! Kanska fleiri av teim 2000 kvinnunum fingu hug at flyta heim, um tær kendu, at tær sóust aftur – eisini í leiðarastørvunum í landinum!

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.